# Hvussu er at koma heimaftur eftir lesnað?

Altjóða Skrivstovan, sum ger eitt sera stórt arbeiði fyri at kunna um lestrarmøguleikar hjá føroyingum í útlandinum, hugsar eisini um at kunna um møguleikarnar hjá føroyingum, sum eru lidnir at lesa,ið himaftur og fáa arbeiði her. Í hesum sambandi fer stovnurin at skipa fyri stórum almennum fundi í Miðlahúsinum hósdagin 28. Desember. Torkil Ejdesgaard, sum lestur í útlandinum fer at tosa um vónir, ynski og krøv til at koma heimaftur. Jóannes Vitalis Hansen, sum hevur lisið í Bretlandi og júst er komin heimaftur og nú starvast hjá SSL fer at greiða frá sínum metingum. Ætlanin er at onkur frá VMR ella MMR fer at siga nakað um tey tilboð, sum eru í Føroyum til vælútbúnar føroyingar, sum koma heimaftur. Djóni Dalsgard frá Føroya Tele fer at greiða frá tilboðum og møguleikum sum heild og serstakliga fyri føroyingar, sum hava tikið útbúgving í útlandinum.

Eisini fara umboð fyri MFS og útlendskir studentar at tosa um fyrisitingarlig viðurskifti, nú so mangir føroyingar, umleið 200, lesas uttan fyri kongaríkið. Umleið 550 lesa í Føroyum og umleið 900 í Danmark.

Altjóða Skrivstovan vil fegin hoyraumgóðar og ringar upplivingar millum lesandi í útlandinum fyri harvið at kunna virka fyri at betra um upplýsingina til framtíðar lesandi, sum ætla sær her serstakliga at lesa uttanfyri Danmark.

Tiltakið er 28. dsember kl. 20. Miðlahúsinum.





# Martin Joensen og Hinir í Miðlahúsinum

Fríggjakvøldið 29. desember kl. 20 verður forvitnislig café-konsert í Miðlahúsinum, har Martin Joensen og Hinir m.a. framføra løg úr nýggju fløguni "Á Brúnni".

Henda útgávan hevur fingið sera góð ummæli við á vegnum, so nú verður høvi at gera sær sína egnu meting av verkinum, meðan lurtað verður í friði og náðum í hugnaligu Miðlahúsunum. Væntandi verður onkur av gomlu klassikarunum eisini at hoyra hetta kvøld stutt fyri árslok.

Bólkurin hjá Martini hevur góð trý ár á baki, og hevur spælt á flestu føroysku festivalunum umframt á smærri spælistøðum kring landið. Stílurin kann kanska kallast vísukendur folk-rock-tónleikur við einum farra av Vestmannasoundi. Tónleikararnar handan navnið "Hinir" eru: Jákup Zachariassen, steel og dobro, Eyðun Mohr Hansen, guitar, Jónleiv Jensen, slagverk/ trummur og Pauli Magnussen, bass. So ynskir tú at siga farandi árinum farvæl við sorgblíðum akkustiskum tónum frá Martini og Hinum, so er bara at møta upp í Miðlahúsinum friggjakvøldið 29. des.





# Villmenn í Miðlahúsinum

Mikukvøldið 27. desember kl.19 verður útgávukonsert við Villmonnum í Miðlahúsinum í Vágsbotni. Villmenn hava júst givið út fløguna "Villmannatjóðin", og á konsertini fara teir at spæla løg av fløguni. Møguleiki verður eisini fyri at ogna sær nýggju fløguna hjá Villmonnum fyri serprís. Hetta er fyrsta konsertin hjá Villmonnum, síðan nýggja fløgan "Villmannatjóðin" kom út.

Hóast stutt er síðani, at fløgan kom út í handlarnar, eru fleiri sera positivar afturmeldingar komnar frá fólki, sum hava keypt fløguna. Fólk hava lagt merki til alla ta orku, sum Villmenn hava lagt í fløguna, so at hon skal vera so góð sum gjørligt. Fløgan er full av góðum sangum, sum hava nakað at siga okkum, og øll løgini fella saman í eina hægri eind.

So um tit hava hug at hoyra nakrar villmannatónar eftir at jólavasið er farið afturum, so er at koma oman í Vágsbotn mikukvøldið klokkan 19:00. Tiltakið er alment og ókeypis.

www.villmenn.info
villmenn@gmail.com